52-161/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 161/20 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, um tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar varð slept ?
2. Hevur fakkunnleikin viðmælt at taka tilmælið um heimauppihald burtur ?
3. Er ætlanin at seta tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar í gildi aftur ?

Svar:

Til nr. 1

Heimauppihaldið er ongantíð slept.

Heimauppihaldið varð fyri góðum mánaði síðan tillagað, soleiðis at tey, ið ikki eru koppsett, fingu fríari ræsur.

Tær einastu avmarkingar fyrstu fýra dagarnar eru at halda seg frá størri mannfjøldum, har smittan skjótt kann nørast. Hetta kann verða føðingardøgum, veitslum, náttarlívinum, kirkju- og samkomum og størri ítrótta og tónleikatiltøkum.

Orsøkin til, at landsstýrið tók hetta stig var góða smittugongdin og støðuga framgongdin við at koppseta.

Í sama viðfangi øktu vit um kanningarmøguleikarnar, soleiðis at tað ber til at lata seg kanna allar dagarnar í vikuni.

Til nr. 2

Føroyski koronapolitikkurin hevur síðani mars mánað í 2020 hvílt á eina javnvág millum heilsufaklig atlit og samfelags atlit. Hvørja ferð landsstýrið hevur tikið stig til at broyta tilmælini, hava heilsufakligu myndugleikarnir eisini sagt sína hugsan. Í mun til tillagaða heimauppihaldið vórðu tey eisini spurd til ráðs.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Til nr. 3

Sum støðan er í løtuni er ikki ætlanin at broyta heimuppihaldið aftur. Landsstýrið fylgir støðugt gongdini, og er neyðugt at endurskoða galdandi skipanir, verður tað gjørt.

Í Tinganesi, 18. juni 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður